# TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



## søkir eftir lærarum

Okkum tørvar 4 lærarar í august 2007. Talan er um føst størv á:

- Maskindeildini
- Bildeildini
- Eldeildini
- Trædeildini

**Vit vænta, at tú hevur:**
- sveinabræv innan økið
- evni og hegni at arbeiða við ungdómi
- viðkomandi starvsroyndir
- hollan og dagførdan kunnleika innan økið

Fyrimunur er, um tú hevur víðari útbúgving, teldukunnleika og førleika at undirvísa í alm. lærugreinum.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv, saman við royndum starvsfeløgum
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving innan økið
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

**Tú:**
skal senda umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndum innan 7. juni 2007 til:

Tekniska Skúlan í Tórshavn, Postrúm 3239, 110 Tórshavn

Um tú vilt vita meira um starvið, kanst tú ringja á tlf. 308050 og spyrja eftir:

- **Helga Mortensen**, deildarleiðara á maskindeildini
- **Eirik Ó. Simonsen**, deildarleiðara á bildeildini
- **Jógvan Sørin Hansen**, deildarleiðara á eldeildini
- **Atla Poulsen**, deildarleiðara á trædeildini,

Størvini, sum umfata undirvísing av maskinsmiðum, bilsmiðum, el-lærlingum, timbur- og snikkaralærlingum, skulu setast 9. august 2007. Fyrstu 2 árini eru royndartíð, har tú, sum settur/sett verður í starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg námsfrøðiliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur/sett í fast starv.

**Maskindeildin** tekur sær av undirvísing av maskinsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 6 lærarar og ein verkvørður.

**Bildeildin** tekur sær av undirvísing av bilsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 4 lærarar og ein verkvørður.

**Eldeildin** tekur sær av undirvísing av el-lærlingum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 5 lærarar og ein verkvørður.

**Trædeildin** tekur sær av undirvísing av timbur- og snikkaralærlingum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 7 lærarar og ein verkvørður.

Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og teimum víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur.



# Leyst starv

## Arkitektur á býarskipanardeildini

Tórshavnar kommuna søkir eftir avloysara til býarskipanardeildina at byrja skjótast til ber. Viðkomandi skal vera útbúgvin arkitektur ella hava aðra viðkomandi útbúgving.

**Arbeiðsøkini á býarskipanardeildini eru í høvuðsheitum**
- útstykkingarætlanir
- byggisamtyktir og lokalplanir
- býarplanlegging
- sektorplanlegging
- verkætlanarskitsur og málsuppfylging
- bygging av kommunalum bygningum
- luttøka í verkætlanum við eksternum ráðgevum
- samskifti við áhugabólkar, feløg, privatpersónar og stovnar

**Býráðið roknar við, at umsøkjarin**
- er útbúgvin arkitektur ella hevur viðkomandi útbúgving
- hevur royndir innan planlegging, projektering, eftirlit og umsiting
- hevur góðan kunnleika til EDV (Microsoft Windows, Word, Excel og Outlook, umframt Cad tekniprogram og/ella MicroStation)
- dugir væl føroyskt, bæði í skrift og talu
- arbeiðir sjálvstøðugt og dugir væl at leggja arbeiðið til rættis
- er fyrikomandi og dugir væl at arbeiða saman við starvsfólkunum á deildini

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Mikael Viderø, býararkitekt, ella Jákup Egholm Hansen, tekniskan stjóra, tlf. 30 20 10.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera Tórshavnar kommunu, postsmoga 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 11. juni 2007 kl. 12:00. Viðmerk á brævbjálvan „arkitektur til býarskipanardeildina."

REPROZ

**Tórshavnar kommuna**

# FA. GRAVSTEINAR




*Opið: mánadag - fríggjadag 9^00-17^00*
*annars sambært avtalu.*

*Nýggj vøruskrá fæst!*

Sjónband - 31 77 74



## Frá 1. juni verður opið soleiðis:

**Mánadag – fríggjadag:** 8:00 – 15:00

Bílegging til levering aftaná kl. 15:00 má vera okkum í hendi áðrenn kl. 12. sama dag

Smyrjibreyðsbúðin

Bøgøta 14 · 100 Tórshavn · tel 32 16 18